

*Manningin á Teistanum var tann fyrsta, sum uppdagaði, at bretar høvdu funnið olju við føroyska markið*

## *BP-stjóri um Hetlandsrennuna:*

# Eitt nýtt og spennandi oljuævintýr í eygsjón

*-Upp á longri sikt er her talan um einki minni enn eitt nýtt og spennandi oljuævintýr, sum sær sera lovandi út. M.a. hetta sigur ein av stjórunum í bretska oljufelagnum BP í einum tíðindaskrivi, sum er sent heimspressuni, nú bretar hava rakt við enn eina risastóra oljukeldu í Hetlandsrennuni.*

Hetta er onnur oljukeldan, sum BP hevur funnið stutt frá føroyska markinum. Tað var fyrr í ár, at tað lak út, at BP hevði funnið "okkurt stórt" millum Hetland og Føroyar og nú er tað so váttað.

Í tíðindaskrivinum, sum vit prenta í fullum líki, verður sagt, at BP nú av álvara er farið at fyrireika seg til bora eftir olju í hesum nýggja økinum. Tær báðar oljukeldurnar eru á 375 metra og 500 metra dýpi og hava longu fingið navn, Schiehallion og Foinaven. Tær eru uppkallaðar eftir fjøllum í Skotlandi.

Eftir øllum at døma leggja BP og Shell, sum samarbeiða í hesum økinum, sera stóran dent á hetta nýggja oljuøkið, tí farið verður undir víðari boringar longu í hesum árinum við tí fyri eygað at byrja veruliga framleiðslu um nøkur fá ár.

Av tí at hetta økið er heilt nýtt í oljuvinnuni er eingin infrastrukturur har og sum eina byrjan ætla feløgini at brúka flótandi oljupallar. Er talan veruliga um eitt heilt stórt oljuøki fara feløgini at umhugsa at útbyggja infrastrukturin á sama hátt sum í Norðsjónum.

Tey bæði oljufeløgini fara næsta ár at halda fram við at leita eftir nýggjum oljukeldum og er ætlanin at gera seks boringar har í økinum.

Sosialurin hevur skilt, at í BP síggja teir sera bjartskygt upp á framtíðina, nú tað hevur eydnast at finna fleiri oljukeldur í Hetlandsrennuni. Tær stóru upphæddir teir longu hava lagt í seismiskar kanningar og boringar hava givið óvanliga góð úrslit og verður nú alt gjørt fyri at skunda undir leitingina og eina komandi framleiðslu.

Í Hetlandi og í Orknoyggjum verður fylgt sera væl við, hvat hendir á økinum millum Hetland og Føroyar. Her síggja tey nú heilt nýggjar vinnulívsmøguleikar og tað er heldur eingin loyna, at tað eisini verður hugt við stórum spenningi, hvat fer at henda á føroyska økinum.

**jan**

**BP discovers second oil field west of Shetland**

BP announced today that it had made a second oil discovery west of Shetland and said it was considering an early development scheme to produce oil from the area.

The find, which has been named *Schiehallion*, a block 204/20, held 50:50 by BP and Shell, and lies 150 kilometres offshore in some 375 metres of water. It has estimated recoverable reserves of 250–500 million barrels of oil.

Schiehallion is some 15 kilometres north-east of Foinaven, an existing discovery which lies in 500 metres of water in block 204/24a, held 80 per cent by BP and 20 per cent by Shell. Foinaven also has reserves estimated at 250–500 million barrels. Both fields have been named after Scottish mountains.

BP, as operator, said it and Shell were currently considering a variety of options to produce oil from the area, the first phase of which could be a floating production scheme on Foinaven capable of producing around 100,00 barrels a day within the next few years.

The company said it was reviewing proposals from offshore contractors for a range of floating production systems and, subject to board and Government approvals, expected to begin development drilling later in the year.

BP Chief Executive Davide Simon described the plans as »an essential first phase in the development of what promises over the longer term to be an exciting new oil play«.

He said: »These discoveries are further examples of the growing success of our frontier strategy and will help reshape the portfolio in the longer term. We intend to develop them in a phased manner, using cost-effective engineering, sharing ideas with contractors and partners and achieving a level of capital efficiency which ensures that tey remain robust to a low oil price«.

BP Exploration Chief Executive John Browne said: »The technical challenges of producing oil in these water depths are considerable. But we and our partners, Shell, have extensive experience of working in deep water. As a first stage we are proposing and efficient early-production scheme to develop at low cost some of the reserves already identified. This will give us the opportunity to appraise the wider potential of the basin and, depending on our success, to consider the optimal infrastructure for the longer term«.

The company said it would be consulting with the Shetland and Orkney Islands Councils and other relevant bodies, including fishing and environmental organisations.

BP and Shel jointly hold ten blocks and part-blocks covering 1,500 square kilometres in the areal around the discoveries and are planning to drill up to six appraisal and exploration wells in the coming year.

# Farloyvisskipan krevur lógarbroyting

Í stýrinum fyri Arbeiðsloysisskipanina er uppskotið hjá Kristiani Magnussen, sosialráðgeva á Sosialu deild Býráðsins ikki ókent, tó at stýrið ikki vil taka støðu til tað, tá einki skrivligt uppskot er lagt fram.

Høgni Joensen, formaður í stýrinum fyri ALS, sigur við Sosialin, at eitt líknandi uppskot hevur verið frammi, har tað skal verða loyvt sjálvstøðugum vinnurekandi at frásiga sær rættin til stuðul úr ALS eina tíð, eitt nú um fólk fara í læru, ætla sær burtur o.s.fr. Eftir hesum uppskoti skuldu fólk havt rætt til at koma inn aftur í skipanina, og at farloyvistíðin úr skipanini ikki skuldi telja við.

- Fyri hálvum ári síðan mælti stýrið landsstýrinum til at broyta lógina, men vit ikki einki frætt aftur úr landsstýrinum, sigur Høgni Joensen.

- Av tí at stýrið ikki kennir forsorgarlógina og hvussu hetta hevði ávirkað arbeiðsloysisskipanina, verður einki gjørt við málið frá okkara síðu, sigur Høgni Joensen.

*Framhald á síðu 6*

**Dagny**